

www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 12 - 2011

# Kina keypir olju úr Afghanistan

Fyri fyrstu ferð hevur Afghanistan skrivað undir ein veruligan sáttmála um at selja øðrum landi olju. Sáttmálin er gjørdur við tað almenna kinesiska oljufelagið China National Petroleum Corporation (CNPC), og hann skal geva landinum góðar sjey milliardir dollarar ella einar 40 milliardir krónur tað næsta 25 ára skeiðið. Sáttmálin gevur tí kinesiska felagnum loyvi til at útvinna olju í trimum økjum fram við Amu Darya-ánni í tí partinum av Afghanistan, har tað er toliliga friðarligt. Eftir sáttmálanum, sum bleiv undirskrivaður í Kabul í dag, fær Afghanistan 70 prosent av nettovinninginum, og tað kinesiska felagið skal rinda 15 prosent í partafelagsskatti. Afghanski tilfeingismálaráðharrin, Shahrani, segði aftan á undirskrivingina í Kabul, at sáttmálin er sera góður fyri Afghanistan. Tíðindastovurnar skriva, at fýra onnur lond vístu áhuga fyri teirri afghonsku oljuni, men at Kina, sum hevur stóran tørv á orku uttaneftir, kom við tí hægsta boðnum og tryggjaði sær sáttmálan. Serfrøðingar halda, at umleið 87 milliónir tunnur av olju eru í teimum afghonsku keldunum. Í altjóða høpi er tað ikki nógv, men oljan kann kortini fáa stóran týdning fyri landið. -Siga vit, at tað snýr seg um 87 milliónir tunnur, og hvør tunna er 100 dollarar verd, fær Afghanistan sjey milliardir dollarar tey næstu 25 árini, segði Shahrani við tíðindafólk, eftir at hann hevði skrivað undir. Kinesiska felagið fer undir virksemi sítt við Amu Darya-ánna eina ferð í tí nýggja árinum. Afghanistan sjálvt innflytir í løtuni olju og gass, og so seint sum í gjár skrivaði landið undir ein sáttmála við Iran um at keypa eina millión tons av olju og benzini haðani.